VINNUMÁLARÁÐIÐ

KT-FYRISITINGIN

## Søkt verður eftir starvsfólki til KT-skivuna

Vinnumálaráðið søkir eftir einum starvsfólki til KT-skivuna hjá KT-fyrisitingini.

KT- fyrisitingin er ein deild í Vinnumálaráðnum, ið tekur sær av kunningartøkniligari samskipan innan landsfyrisitingina sum heild.

KT-fyrisitingin útvegar undirstøðukervi, felags nýtsluskipanir og standardforrit, sum fyrisitingarligar eindir hjá landinum kunnu fáa atgongd til. Hetta undirstøðukervið verður nevnt Lands-NET, og er eitt rættiliga stórt kt-kervi við gott 500 brúkarum, og støðugt vaksandi.

**Starvið:**
Í dag starvast tvey fólk í KT-skivuni og uppgávan er í høvuðsheitum at ráðgeva og vegleiða teldubrúkarum, tá hesir hava tørv á hjálp. Talan kann verða um ráðgeving og vegleiðing í nýtslu av felags nýtsluskipanunum og standardforritum ella meiri tekniskari hjálp.

**Arbeiðsuppgávur:**
- taka í móti og skráseta fyrispurningar frá brúkarum
- um gjørligt, at hjálpa brúkarunum við trupulleikum
- senda fyrispurningar víðari til serkøn innan KT
- tryggja at brúkari fær hjálp
- brúkaraumsiting

Talan er um eitt nýtt starv í eini rættiliga nýggjari fyrisiting, og skal tann, sum settur verður, tola møguligar broytingar í starvsinnihaldinum.

**Førleikakrøv:**
Vit vænta okkum av umsøkjarum, at teir hava:

- Kunnleika og royndir innan KT
- Royndir við teimum vanligastu KT-forritunum (MS Office v.m.)
- Hegni til at vegleiða brúkarum í nýtsluni av KT
- Viðkomandi útbúgving ella starvsroyndir innan KT
- Ídni, áræði og góð samstarvsevni

**Vit bjóða:**
Vit bjóða eitt fjølbroytt, spennandi og avbjóðandi starv í einum umhvørvi, ið tú sjálv/sjálvur verður við til at skapa. Til tíðir strævið, men samstundis sera áhugavert og mennandi. Fjølbroyttar arbeiðsuppgávur, har tú fert at arbeiða í tøttum samstarvi við starvsfólkini í landsfyritøkuni. Góðar møguleikar fyri skeiðum og eftirútbúgvingum.

**Setanartreytir:**
Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag. Setanin umfatar Vinnumálaráðið og stovnar undir tí, umframt onnur stjórnarráð.

**Umsóknir:**
Umsóknir við prógvum, CV o.ø. skulu sendast til:

***Vinnumálaráðið***
*Tinganes*
*Postsmoga 377*
*110 Tórshavn*

Umsóknir skulu vera Vinnumálaráðnum í hendi í seinasta lagi mánadagin 21. mai 2007. Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til Gunnar Toftegaard, tlf. 35 60 78.




SETHÚS | VIRKISBYGNINGAR | UMVÆLINGAR | SERUPPGÁVUR

Búsetur søkir eftir:

## Timburmonnum, byggifrøðingi og skrivstovulærlingi

**Timburmenn/snikkarar**
Vit hava størri og smærri byggiuppgávur í gerð og fyri framman, so talan er um fjølbroyttar arbeiðsuppgávur. Søkt verður tí eftir timburmonnum, snikkararum og royndum fólki innan byggiyrkið.

**Byggifrøðingur**
Vaksandi virksemi okkara hevur viðført, at tørvur er á byggifrøðingi ella fólki við líknandi førleika.

Arbeiðsuppgávurnar eru m.a. at gera uppskot, tilboðsrokning og kostnaðarmetingar í sambandi við byggiarbeiði umframt at standa fyri verkætlanum, góðskutrygging og eftirliti í byggiarbeiðum.

**Skrivstovulærlingur**
Tann, ið kemur í læru, kemur at læra alt vanligt bókhalds- og skrivstovuarbeiði. Vit brúka nýmótans telduskipanir sum t.d. Navision Attain, LøttLøn og Microsoft forrit.

Lærutíðin er vanliga 3 ár, men tað velst um, hvørja útbúgving ein hevur frammanundan. Vit leggja dent á at fáa lærling, sum hevur miðnámsprógv og er fyrikomandi.

**Umsøkjarar**
Vit liva av nøgdum viðskiftafólki og ynskja tí, at tú ert fyrikomandi, ágrýtin og hevur góð samstarvsevni. Tað er ein fyrimunur at hava viðkomandi starvsroyndir.

**Vit bjóða**
Vit kunnu bjóða spennandi og fjølbroytt størv í góðum arbeiðsumhvørvi. Løn sambært avtalu.

**Búsetur**
Búsetur er eitt væl skipað byggivirkið í stórum vøkstri. Vit hava stór og smá arbeiðir í gerð í meginøkinum. Vit eru um 30 fólk, sum eru samansett av handverkarum, arbeiðsmonnum, timburlærlingum, byggifrøðingi, byggiteknikara og roknskaparfólki. Tað er mennandi og hugaligt at arbeiða hjá Búsetur, tí vit hava væl skipað viðurskifti, arbeiða í toymum og eru í støðugum vøkstri.

**Send umsókn**
Skrivlig umsókn við viðmælum og prógvum kann sendast til: Búsetur sp/f, Reynsgøta 14, FO-160 Argir ella til busetur@busetur.fo í seinasta lagi 25. mai 2007.

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til Duritu Djurholm, tlf. 230833, durita@busetur.fo ella Sjúrður Holm, tlf. 210830, sjurdur@busetur.fo.

BUSETUR

Tel 310 830 | www.busetur.fo

BYGGIMEISTARI · TEL +298 210 830 · FAX +298 310 842

## HÚS TIL SØLU Í VÁGI

Um nóg høgt boð fæst.

**Tel 373625**

## Starvsfólk til Starvsmannafelagið

**Starvsmannafelagið søkir eftir starvsfólki til umsiting felagsins at byrja eftir avtalu.**

**Uppgávur:**
Starvsmannafelagið er í holtur við at menna felagið og sóknast tí eftir fólki, ið við ágrýtni og fakfelagsanda skal røkja áhugamál felagsins og verða viðspælari hjá nevnd og tæna limum felagsins. Tú kemur at starvast í umsiting felagsins og eisini taka lut í dagliga umsitingarliga arbeiði felagsins. Høvuðsdentur verður lagdur á uppsøkjandi arbeiði, tiltøk í húsum okkara og vera við til at stinga út í kortið framtíðarhugsjónir felagsskapi okkara at gagni.

**Førleikar:**
Vit leita eftir einum starvsfólki við kunnleika til og áhuga fyri fakfelagsarbeiði, ið eisini hevur góð samstarvsevnir og hevur lætt at samskifta.

Kravt verður, at tú megnar at arbeiða sjálvstøðugt og undir trýsti.

Fyrimunur er at hava umsitingarligar royndir, góðan telduførleika, umframt góðan kunnleika til enskt.

**Setanartreytir:**
Starvið er fulltíðarstarv, við møguleika fyri niðursettari arbeiðstíð.

Vit bjóða eitt livandi og avbjóðandi starv við menningarmøguleikum, har tænasta og limarøkt er í hásæti.

Starvið verður sett og lønt eftir sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknin skal vera Starvsmannafelagnum í hendi 31. mai 2007. Merkið brævbjálvan: Umsókn.

Meira fast at vita um starvið við at venda sær til Gunnleiv Dalsgarð, formann felagsins á tlf. 314868.

**Starvsmannafelagið**
**J.H. Schrøtersgøta 9**
**Postboks 165**
**110 Tórshavn.**
**Starvsmannafelagið**

Starvsmannafelagið er stórsta fakfelag á almenna arbeiðsmarknaðinum við uml. 1900 limum, sum starvast í teimum 4 sáttmálaøkjum felagsins, Fíggjarmálaráðnum, Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya, S.E.V og Føroya Tele (Føroya Arbeiðsgevarafelag), felagið hevur í dag tilsamans 116 álitisfólk á arbeiðsplássunum innan sáttmálaøkini. Starvsmannafelagið gevur út Starvsblaðið og hevur umframt kunning á heimasíðu felagsins www.starvsmf.fo. Í umsiting felagsins starvast formaður og skrivari felagsins.

parfumarí Drós

Til Sølu

- Handilin er í støðugari framgongd
- Umboðar tey kendastu merkir
- Liggur væl fyri í miðbýnum
- Góðan kundaskara

Vil tú hava avbjóðingar er hetta ein góður møguleiki.

Meir fæst at vita við at venda sær til tlf 514811 ella á mail dros@dros.fo

CLINIQUE

ESTĒE LAUDER

aramis

ORIGINS